**Leiðreglur um nýtslu av skúlabygningum í Tórshavnar kommunu**

***§ 1. Vavi***
1. Hesar leiðreglur fevna um øll høli í fólkaskúlunum hjá Tórshavnar kommunu, undantikið fimleikahallirnar í skúlunum, ið verða útleigaðar av Ítróttaranleggum.

***§ 2. Myndugleiki á staðnum***
1. Um ikki annað er ásett, er tað skúlaleiðslan, ið tekur avgerð viðv. láni/leigu av hølum skúlans.

***§ 3. Endamál***
1. Endamálið er at stimbra undir, at skúlarnir kunnu virka sum aktivir mentanardeplar í lokaløkinum við virksemi fyri børn, ung og vaksin. Hølini kunnu nýtast til frítíðarendamál, mentan, undirvísing og ítrótt, ið eru í samsvari við skúlans tørv.
2. Møguleiki er fyri fráviki í bygdunum, ið ikki hava aðrar samkomu møguleikar sum t.d. ítróttahallir og bygdarhús., ið rúma ætlaða tiltakinum ella virkseminum. Loyvi verða givin av skúlaleiðsluni, og um ivamál eru av mentamáladeildini.
3. Hølini verða ikki leigað til vinnuligt endamál.
4. Hølini verða ikki lænt/leiga til privat endamál t.d. til veitslur.
5. Foreldur kunnu læna høli til foreldratiltøk uttan gjald
6. Hølini verða latin íroknað ljós, hita, reingerð, innbúgv og útgerð, sum er í hølunum, um ikki annað er ásett.

**§ 4. Serlig endamál í skúlanum**
1. Hølini kunnu verða brúkt til næmingaveitslur og starvsfólkaveitslur.

***§ 5.* Høli**
1. Leigarin/lánarin hevur í samráð við leiðsluna ábyrgd av at fyrireika rúmið til tiltakið og at lata hølini aftur ruddað og í góðum standi og skal seta upp á pláss aftur.
2. Leigarin/lánarin skal læsa og vissa sær, at hurðar og vindeygu eru afturlatin.

**§ 6. Skilhald og ábyrgd**
1. Hølini kunnu bert nýtast til avtalað endamál, ta tíðarskeið og við teimum treytum, ið eru avtalaðar.
2. Ábyrgdin fyri nýtslu av hølum áliggur leigaranum/lánaranum. Um tað hendir skaði á høli og innbúgv (sum ikki skyldast vanligari nýtslu), skal boðast skúlaleiðsluni frá beinanvegin og verður serskild rokning at rinda.
3. Ognarlutir, ið verða tiknir við í skúlan, eru uppá egna ábyrgd.
4. Lyklar skulu latast aftur skjótast til ber eftir, at leigumálið er endað.

**§ 7. Aðrar serásetingar**
1. Møguligar serreglur fyri ávís høli skulu haldast.
3. Køkur í skúlum kann bert lænast út til undirvísingarendamál.
4. Loyvt er at borðreiða í sambandi við tiltøk treytað av, at tað verður ruddað. Um ikki er nóg væl ruddað, verður gjald kravt fyri rudding og reingerð.
5. Loyvt er at seta upp kaffimaskinur, el-ketil og ljóðanlegg, men ikki er loyvt at seta onnur tól til elskipanina uttan loyvi frá skúlaleiðsluni.

**§ 8. Undirvísingarútgerð**
1. Undirvísingarútgerðin kann verða nýtt við teirri treyt, at leigarin/lánarin hevur góðan kunnleika til nýtsluna av útgerðini og ikki ger broytingar í uppseting og skipanarbygnaði.
2. Tað ber ikki til at brúka av tilfarsgoymsluni hjá skúlanum.

**§ 9. Gisting**
1. Tað ber til at brúka hølini til gisting  til tiltøk, stevnur, skúlaflokkar o.a. við teirri treyt,  at talan ikki er um vinnuligt endamál.
2.  Stk. 1 er ikki galdandi fyri Sankta Frans skúla.
3. Prísurin fyri gisting er 15 kr. um dagin fyri hvønn. Aftrat hesum er reingerð, sum verður avtalað við skúlan.

**§ 10. Aðrar ásetingar**
1. Ikki er loyvt at lata leigumálið víðari til triðja persón (onnur).
2. Leigarin ger seg kunnugan við møguligar trygdarskipanir.
3. Í serligum førum kann skúlin við stuttum varningi avlýsa møguleikan at brúka ávíst høli ella vísa á annað høli.
4. Um tørvur ikki longur er á høli skal boðast skúlaleiðsluni frá.
5. Ikki er loyvt at hava stearinljós og annan opnan eld í skúlanum.
6. Skúlin og kommunan hava ikki ábyrgd av trygging av virkseminum.
7. Er tørvur á húsavørði ella eyka reingerð, kann serskilt gjald verða kravt fyri tað.

**§ 11. Endurskoðan**
1. Leigumál kunnu vera upp til eitt skúlaár í senn og verða endurskoðað árliga.
2. Í serligum førum kann mentamáladeildin loyva undantaki frá ásetingum í hesum leiðreglum.

**§ 12. Uppsøgn og uppathald**
1. Avtala um fasta leigu/brúk kann uppsigast av báðum pørtum við einum mánað varningi uttan nærri grundgeving.
2. Skúlin kann siga avtaluna upp uttan varning, um talan er um mishald av avtaluni.

**§ 13.**
Skúlaleiðarin kann í einstøkum førum geva undantak frá hesum leiðreglum í samráð við Mentamáladeildina.

**§ 14. Gildiskoma**
1. Leiðreglurnar koma í gildi dagin eftir, at tær eru samtyktar av mentamálanevnd Tórshavnar býráðs.

*Samtykt á fundi í mentamálannevndini 10. februar 2016.*